Hevði ikki verið í skúla í 20 ár:

# Nú er hon Føroya fyrsti fiskavirkari

**Maud Túgvustein úr Fuglafirði kann nú at røttum kalla seg Føroya fyrsti fiskavirkari. Hósdagin stóð hon endaligu royndina, sum var ein praktisk roynd á virkinum hjá Fiskavirking í Saltangará, har hon hevur verið í læru, samstundis sum hon hevur verið knýtt at Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna.**
**– Hetta hevur verið ógvuliga spennandi og áhugavert, men eisini ein strævin tíð, og nú eg eri liðug, eri eg ovurhonds glað, sigur hon**



*Maud saman við trimum starvsfeløgum, sum hava verið holl í ráðum undir útbúgvingini, f.v.: Kims Lamhauge, formaður í reinskerihøllini, Maud Túgvustein, fiskavirkari, Lina (Jolina) Højgaard, góðskuleiðari og Charles Johansen, formaður í maskinhøllini*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

FISKAVIRKARI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað ljóðar kanska undarligt í oyrunum hjá summum, at ein 40 ára gomul kvinna nú kann rópa seg Føroya fyrsti fiskavirkari.

Hópur av røskum og kvikum kvinnum hava staðið á fiskavirkisgólvum kring landið í mong ár, og semja man vera millum manna um, at tað ikki eru hesar, sum gera, at virkini liggja tungt í sjónum í løtuni.

Fleiri av hesum kvinnum hava staðið við reinskeriella pakkiborð í mong Harrans ár, og tær duga sítt handverk til lítar.

At arbeiði á fiskavirkjunum mangan er óstøðugt við tí úrsliti, at nøkur fólk stundum koma og fara, kanska serliga á teimum stóru virkjunum, er so ein onnur søga. Men tær royndu kvinnurnar eru avgjørt gull verdar fyri virkisleiðslurnar.

Eingin ivi um tað.

Hesar royndu kvinnur fáa tó sum er lítið »bonus« fyri sín dugnaskap, men eru løntar við einari ella tveimum krónum meira enn tær, ið detta inn av »gøtuni« og ongantíð hava fingist við fisk áður.



*- Eg eri ovurhondsfegin, nú eg eri liðug við mína útbúgving sum fiskavirkari, sigur Maud Túgvustein*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Fiskavirkari

Nú hava vit so fingið okkara fyrsta fiskavirkara við eini útbúgving, sum í minsta lagi gevur henni eina handverkaraløn – eisini, um hon fer at arbeiða einum fiskavirkisgólvi, nú hon er liðug.

Kvinnan er Maud Túgvustein úr Fuglafirði, sum er gift Hensari Túgvustein, ið er ættaður úr Æðuvík.

Hósdagin stóð hon sína seinastu roynd í hesi útbúgving, sum hevur tikið henni tilsamans trý ár. Hon fekk eitt 9-tal, tá ið hon skuldi »forsvara« høvuðsuppgávuna, hon hevur skrivað um virkið hjá Fiskavirking í Saltangará, har hon fyrstu ferð var til arbeiðis longu í 1985, men hevur við millumbilum verið í arbeiði aðrastaðni. Og tó; árini á virkinum í Saltangará eru vorðin mong, nú vit skriva 2005, og tað er eisini her, hon nú hevur fingið sína útbúgving. Meðan hon hevur verið í læru, hevur hon eisini starvast á øðrum virkjum hjá Føroya Fiskavirking, eitt nú á Toftum, Miðvági og í Havn.

– Eg hevði skrivað mína høvuðsuppgávu um virkið hjá Fiskavirking í Saltangará, og uppgávan hjá mær hendan dagin var at »verja« tað, sum eg skrivi.

Maud stóð hesa seinastu royndina væl og virðiliga, og nú bíðar hon eftir prógvi og sveinabrævi sum fyrsti føroyingur við útbúgvingini, fiskavirkari.

Kontaktpersónur á virkinum í Saltangará hevur verið Jolina Højgaard, ið starvast á virkinum sum góðskuleiðari. Lina, sum hon verður rópt, hevur verið í starvi á flakavirkinum í Saltangará í samfull 29 ár.

– Hetta hevur verið ein ógvuliga áhugaverd, spennandi og lærurík tíð, men hetta hevur eisini verið strævið. Nú eg eri liðug við útbúgvingina og fái prógvið frá Fiskivinnuskúlanum, 23. juni, eri eg ovurhonds glað.

Henda útbúgving, sum verður tikin sambært eini kunngerð frá 13. juni 2002 um yrkisútbúgving innan fiskavirking og aling, er so nýggj, at Maud, tá ið vit tosaðu við hana seint um kvøldið, sum hon var liðug um dagin, ikki var heilt greið yvir, hvør fer at handa henni sveinabrævið.

– Marita Rasmussen, sum starvast hjá Vinnuhúsinum, var sensor við seinastu royndina, og eg haldi, at tað er Vinnuhúsið, sum skrivar út sveinabrøvini sambært hesi nýggju útbúgving og kunngerð, sigur Maud.

## Aftur á skúlabonk

Maud var í starvi hjá Fiskavirking í Saltangará, tá ið hon sá ein faldara hjá Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna um hesa yrkisútbúgving.